

# Reyður meiriluti í Danmark

Sambært nýggjari kanning hevði Danmark fingið aðra stjórn, var fólkatingsval nú. Var val til Fóilkatingið nú, høvdu Socialdemokratarnir, SF, Tey Radikalu og Eindarlistin fingið meiriluta í Fólkatinginum við 88 umboðum. Tað vísir ein meiningakanning, sum Megafon hevur gjørt fyri Politiken og TV2. Tann stóri vinnarin er sambært kanningini SF, sum hevði fingið 18,6 prosent og 22 tinglimir. Seinast fekk flokkurin 13 prosent. Socialdemokratarnir høvdu mist 0,1 prosent. Vinstri hevði mist fimm umboð í Fólkastinginum, var val nú, og Konservativi Fólkaflokkurin hevði mist 0,5 prosent. Danski Fólkaflokkurin hevði harafturímóti fingið framgongd upp á 1,8 prosent.

# Eldralóg er eitt krav



**Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna við almannamálum, er sannførd um, at ein eldralóg og eitt krav um røkt er nakað, ið skal raðfestast høgt. Men hon viðgongur, at tað verður trupult at gera hana nú, tí fíggjarorkan hjá Almannamálaráðnum er so lítil**

ELDRAÓRØKT

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár skrivaði Sosialurin um, at eldrarøkt ikki er nakað fólk hava rætt til. Heldur er tað ein olmussa frá myndugleikunum, tí onki stendur í nakrari lóg, at røkt er ein rættur. Hetta líkar ikki Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu.

- Vit mugu sjálvandi hava eina eldralóg, sum staðfestir eitt minstakrav fyri fólk, ið hava tørv á røkt, sigur Rósa Samuelsen. Hon vísir somuleiðis á, at hetta verður ein rímiliga tung tilgongd, tí hetta er ikki nakað landsstýriskvinnan kann broyta í eini kunngerð.

Mann er framvegis ongan veg komin við hesi lóg, men landsstýriskvinnan nevnir, at innan eitt ár, má okkurt vera klárt viðvíkjandi forsorgarlógini, sum eldralógin skuldi verið ein partur av, soleiðis at tey eldru fáa onkran rætt.

## Mangla pengar

Landsstýriskvinnan er somuleiðis hørm um, at játtanin til eldraøkið er skerd so nógv.

- Vit hava mist seks og eina hálva millión, so tað er ikki so løgið, at vit mangla pening á øllum økjum, sigur landsstýriskvinnan, sum helst fer at biðja um eina eykajáttan, tá møguleiki verður fyri tí.

- Men verður ikki møguleiki fyri eykajáttan, so má eg bara gera sum frægast á mínum øki, staðfestir landsstýriskvinnan.

## Alt í ein hatt

Eitt uppskot var á borgarafundinum, um at fáa alla eldrarøkt undir eitt økið, og at tað bara skal vera ein persónur at venda sær til. Hetta er nakað Rósa Samuelsen tekur undir við og hevur arbeitt við.

- Í Norðoyggjum og í Sandoy er tað longu soleiðis, at mann hevur eina skipan, har borgarin bara skal venda sær til ein stovn. Ætlanin er beinanvegin at fáa hetta í øllum teimum seks økjunum í landinum, so tað verður stutt frá borgaranum, sigur Rósa Samuelsen, sum vísir á, at tað skal ikki so nógv til, tí tað bara handlar um at umskipa nøkur arbeiðsgongdir á almannaøkinum.

- Økini eru longu har, so tað kostar í veruleikanum onki at gera hesar broytingarnar, greiðir Rósa Samuelsen frá. Sum metir, at henda loysn verður klár innan eitt hálvt ár.

# Sjúklingur kundi doyð í sjúkrabilinum

**Tá ið ein sjúkrabilur herfyri var í Funningi eftir einum sjúklingi, fingu portørarnir onki gjørt, tí sjúkrabilurin skramblaði so illa á tí ringa vegnum, at tólini til fyrstuhjálpina fingust ikki at virka**

LANDSVEGUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Høvuðvegurin ímillum Funning og Funningsbotn er so ringur, at verður bráðneyðugt at flyta fólk úr Funningi á sjúkrahús noyðist sjúkrabilurin helst at leggja leiðina upp um Eiðisskarð, hóast tað er væl longri at koyra*

*Savnsmynd*

- Landsvegurin ímillum Funning og Funningsbotn er ein tann óslættasti høvuðsvegurin í landinum og hann lýkur als ikki krøvini til ein nútíðar koyriveg.

Tað staðfestir Kári P. Højgaard, løgtingsmaður.

Hann hevur tískil spurt landsstýriskvinnuna í innlendismálum, Anniku Olsen, hvat hon ætlar at gera við málið.

Hann sigur, at veruleikin er, at vegurin er so vánaligur, at í ringasta føri kann tað kosta mannalív.

Og tað var júst tað, sum kundi hent nú einaferð, ein maður í Funningi kom so illa fyri, at ringt var á alarmsentralin, sum beinanvegin sendi sjúkrabil eftir manninum, tí mett var, at hann mátti á Landssjúkrahúsið í stundini.

Men tað kundi enda heilt galið.

- Vegurin er so óslættur, at portørarnir fingu onki gjørt, tí sjúkrabilurin hoppaði og skroppaði so illa, at teir fingu ikki brúkt tólini, sum vóru neyðug fyri at hjálpa sjúklinginum.

Tað var ikki fyrrenn at tey komu á slættari veg, at tólini virkaðu aftur so at sjúklingurin kundi fáa neyðugu viðgerðina í sjúkrabilinum.

Kári P. Højgaard legði afturat, at í hesum føri spældi tað kortini væl av og sjúklingurin fekk ikki varandi mein.

Hann hevur fingið at vita, at uppstendur ein støða sum hendan einaferð afturat, hevði sjúkrabilurin allarhelst tikið leiðina upp um Eiðisskarð, hóast tann vegurin er bæði smalur og krókutur og nakað væl longri enn beinleiðis vegurin framvið fjørðinum.

Kári P. Højgaard sigur, at tað er onki gjørt við vegin síðani í 1988, ella í góð 20 ár og hann heldur ikki, at tað er forsvarligt, at ein vegur skal fella í slíka órøkt, sum støðan er í hesum føri, samstundis sum fleiri nýggir vegir verða gjørdir.

## Kann onki siga

Annika Olsen staðfesti, at bara ein kilometur av vegnum er asfalteraður og at tað fer at kosta níggju milliónir at asfaltera teir fimm kilometrarnar, sum eru eftir.

Hon staðfestir eisini, at á fíggjarlógini í ár, er onki sett av til endamálið og tí fær hon onki sagt um, nær vegurin verður gjørdur.

Tórbjørn Jacobsen ásannaði, at vegurin er vánaligur tó at hann ikki helt, at hann var heilt so vánaligur, sum Kári P. Højgaard vildi hava tað til.

Men hann helt, at tað ljóðar álvarsligt, at tað skal vera so óslætt at tólini í sjúkrabilinum ikki fáast at virka.

- Nú nærkast vit teirri støðu, at vit hereftir fara at brúka tyrluna til neyðsendarørindi í Funningi, heldur enn sjúkrabil, segði Tórbjørn Jacobsen.

Í sambandi við at umsorganarheim er latið upp í Grønulíð verður

Almenn móttøka

**mikudagin 4. februar frá kl. 16.00 til 18.00**

Høvi verður at síggja heimið, og at fáa meir at vita um arbeiðið

Umsorganarheimið
Grønalíð 3
Tórshavn

Bláí Krossur